KRINGVARP FØROYA

# Samskipari til Kringvarp Føroya

Vilt tú vera við til at menna og mynda innanhýsis uppgávur í Kringvarpi Føroya, so er tað møguliga tær vit sóknast eftir. Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert parttíðarstarv, sum tú kanst seta tín egna dám á. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Starvið**
Dagligu arbeiðsuppgávurnar hjá samskiparanum eru fjølbroyttar, og fevna um.:

- ymsar uppgávur í sambandi við eydnuspøl, harundir serliga at útvega vinningar og samskipa innan- og uttanhýsis lýsingar
- at útvega sponsorar til serstakar útvarps- og sjónvarpsframleiðslur, og avgreiða øll viðurskifti í tí sambandi
- at luttaka í arbeiðinum at dagføra og menna samleikan hjá stovninum
- aðrar fyrifallandi uppgávur

**Vit vænta, at tú**

- hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir til starvið
- hevur førleikar innan sølu og marknaðarføring
- hevur kunnleika til og/ella royndir við miðlum og miðlavirksemi
- hevur góð hugskot og er kreativ/ur
- hevur góð samstarvsevni og er jalig/ur
- hevur áræði og arbeiðir sjálvstøðugt
- megnar at halda freistir og er væl skipað/ur

**Setanarviðurskifti**
Talan er um parttíðar starv, og setanarbrøkurin er 0,5. Starvið verður sett eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, og tað er flokkað í lønarflokki 5. Tann, sum verður sett/ur í starv, má tola broytingar í starvsinnihaldinum.

**Umsókn og freist**
Umsókn við prógvum, CV, viðmælum og viðkomandi skjølum skal sendast til umsokn@kvf.fo í seinasta lagi 15. januar 2018. Merk teldupostin "Samskipari" í evnisrútin. Skrivliga tilfarið skal sendast sum ein samlað PDF fíla.

**Upplýingar**
Um tú ynskir meira kunning, ert tú vælkomin at venda tær til Jákupu Mikkelsen, fyrisitingarleiðara, telefon 296525 ella teldupost jakupa@kvf.fo.

*Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýrið við 7 limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur 4 deildir, Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting, og umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.*